# ES-tingið má virðast

Meiningakanningar undan valinum í Danmark í morgin til ES-tingið hava víst, at nógvir danir tíma ikki á val, men sambært forkvinnuni hjá Sosialdemokratunum, Helle Thorning-Schmidt, eru tað ikki bara teir donsku veljararnir, sum hava lítla virðing fyri ES-tinginum og tess arbeiði. Tað sama er galdandi fyri nógvar fólkatingslimir, sigur hon. Javnaðarforkvinnan sigur við Ritzau, at ES-tingið hevur sera stóra ávirkan á nógv ymisk viðurskifti, og tí er tað púra burturvið, tá nógvir fólkatingslimir undirmeta tess týdning. Sjálv var Helle Thorning-Schmidt limur í ES-tinginum frá 1999 til 2004.



# Var við Titanic

Millvina Dean, sum var tað seinasta ferðafólkið frá teirri minniligu ferðini við Titanic, doyði um vikuskiftið á einum ellisheimi í Bretlandi. Hon var 97 ára gomul. Millvina Dean var bara níggju vikur gomul, tá Titanic fórst tann 14. apríl í 1912. Mamma hennara, Georgette Eva, og beiggin, Bertram, sluppu eisini við lívinum, men pápin, Bertram Frank, doyði saman við umleið 1.500 øðrum. Í 1997 fekk Millvina Dean tilboð um at fara um Atlantshavið við Queen Elizabeth II, og hon tók av. Hinvegin havnaði hon einum tilboði um atgongumerki, tá filmurin um Titanic bleiv frumsýndur, tí hon orkaði ikki at síggja tað, sum hendi, segði hon.



*Gongst, sum fyrireikararnir av Fish Expo Faroes ynskja, verður fiskivinnustevnan, sum verður aftur í Føroyum um tvey ár, hildin á Skálatrøð*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

niðuraftur. Tað hevði verið so stórur munur, um vit kundu koyrt frítt runt um tjøldini – og uttan at skula hugsa um, at undirlendið ferst, sigur hann.

### Hongur saman

Fyriskiparin sigur, at enn er ikki endaliga gjørt upp, hvussu nógvar vitjanir vóru á Fish Expo Faroes 2009, men hann heldur, at talið mundi liggja um helmingin av tí, sum vanligt hevur verið til slíkar framsýningar í Føroyum áður.

- Vit gjørdi ikki burtur úr at telja, hvørja ferð fólk komu og fóru fyri at sita eftir við einum stórum tali, men hildu okkum til seld atgongumerki. Tað er jú hetta, sum er avgerandi fyri tann partin av "økonomiini", sum hann tekur til.

Petur Mohr Reinert sigur, at fyri framsýnararnar hevur tað ikki so stóran týdning, hvussu stórt talið av vitjandi er. Tað, sum hevur týdning fyri teir, eru, hvussu stórt talið er av potentiellum viðskiftafólkum.

- Eg ivist onga løtu í, at fíggjarligi ótryggleikin, sum ræður kring heimin, hevur havt sína ávirkan á, at talið av vitjandi, sum bara koma framvið ein túr, hevur verið munandi minni á stevnuni hesaferð enn áður.

### Nøgdir framsýnarar

Fyriskiparin sigur annars, at framsýnarar sum heild vóru væl nøgdir við umstøðurnar í Gundadali, og hóast veðurlíkindini ikki vóru tey bestu allar tríggjar framsýningardagarnar, so bilti hetta ikki fyri tjøldini og umstøðurnar í tjøldunum.

- Jú, vit hava merkt okkum, at framsýnarar sum heild eru væl nøgdir, og nú vit fara at biðja tey, sum við vóru, um sínar viðmerkingar, fáa vit eina uppaftur betri greining av, hvat framsýnararnir hava at siga.

Petur Mohr Reinert sigur, at tó at talið av vitjandi bert var umleið helmingin av tí, sum áður hevur verið til slíkar framsýningar í Føroyum, væntar hann kortini, at tiltakið fæst at hanga saman fíggjarliga.

- Vit hava ikki gjørt endaliga upp enn, hvussu fíggjarligi parturin hevur vignast, men vit halda, at tiltakið fer at hanga saman, sigur hann.

### Ikki minni

Fyrireikarin vísir á, at vónirnar um stevnuna í 2011 eru væl størri enn hesaferð.

- Vit høvdu bert níggju mánaðir at kunna um og bjóða inn til stevnuna hesaferð, men tá stevnan verður hildin aftur um tvey ár, hava vit nógv betri stundir og møguleikar at gera vart við okkum.

Petur Mohr Reinert sigur, at Fish Expo Faroes ikki skal vera minni, enn hon var hesaferð, helst nakað størri.

- Jú, vit fara við treysti undir at fyrireka eina nýggja fiskivinnuframsýning í Føroyum aftur um tvey ár, sigur hann.

Tá heimurin í fjør heyst rendi seg inn í eina altjóða fíggjarkreppu, kom stýgur í hjá fleiri fyritøkum, og tað tók kanska einar tríggjar mánaðir, til fleiri fyritøkur aftur lótu við seg koma og góvu endalig boð um, at tær vildu vera við.

- Vit halda, at útgangsstøðið til næstu stevnu verður nógv betri enn hesaferð, sigur Petur Mohr Reinert.